Sosialurin


# skapur seinkaður



sigur Anders Fogh Rasmussen, sum leggur afturat, at honum als ikki hóvar tað kjak, sum er uppstaðið.

Hevði tað ikki verið eitt hugskot við ein føroyingi sum ríkisumboð – fyri at lætta um harða tónan?

– Altso. Tað er eingin vánaligur tóni millum Føroyar og Danmark. Ríkisumboðið vil altíð vísa størsta virðing fyri Føroyum og føroyingum, sigur Anders Fogh Rasmussen.

– Eg haldi heilt erligt, at nú má tónin dempast eitt sindur. Vit hava gjørt eina avtalu um yvirtøkur. At tað eru nøkur, sum av politiskum áðum ikki eru samd við hesum, tað er so teirra sak. Men tað er tað sama sum at siga, at tað er ein vánaligur tóni millum føroyingar og danir. Tað er tað als ikki, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Anders Fogh Rasmussen vísir altso blankt aftur, at tað skal vera nakað annað enn gott samband og ein góður tóni millum føroyingar og danir.

– Ríkisfelagsskapurin blomstrar, og tónin er betri enn nakrantíð, sigur Anders Fogh Rasmussen.

## Gerið endiliga stýrisskipan

**– Tað stendur Føroyum frítt at smíða ta stýrisskipan, ið føroyingar hava hug til, sigur Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri**

RÍKISFUNDUR

*Heri á Rógvi/*
*Páll Holm Johannesen*

**Leynar:** Arbeiðið við einari føroyskari grundlóg varð fyri kortum broytt til eina nýggja stýrisskipanarlóg, har eitt nú menniskjarættarsjónarmið og onnur sjónarmið verða orðaði. Og tað er eitt arbeiði, ið Anders Fogh Rasmussen einki sigur seg hava ímóti.

– Eg haldi tað vera í lagi, at mann í Føroyum er farin at smíða sína egnu stýrisskipan. Tað er fólkið í Føroyum sjálvt, sum ger av, hvussu tað vil innrætta seg, og hvørja støðu mann hevur í mun til ríkisfelagsskapin, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Hann heldur ikki, at ivamálini um framtíðina hjá Føroyum í ríkisfelagsskapinum skulu vera til hindurs fyri, at føroyingar seta eitt tílíkt mál á dagsskrá í Føroyum.

– Politiska støður millum Føroyar og Danmark eiga ikki at koma í vegin fyri, at man í Føroyum skapar til dagligar politiskar spurningar, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Og sum vant leggur hann bóltin á føroysku hálvuna.

– Tað er mín politiska meginregla, at føroyingar fáa tað, sum teir vilja hava tað. Tað vil altíð vera ein greiður meiriluti fyri at fylgja føroyskum ynskjum á fólkatingi, sigur Anders Fogh Rasmussen.

### Yvirtikið er yvirtikið

Í donskum fjølmiðlum er róð framundir, at tað kann koma upp á tal, at danir aftur yvirtaka – longur yvirtikin – málsøki frá føroyingum aftur, tá ringar tíðir kunnu ávirka samfelagsgongdina somikið í Føroyum. Men tað er ikki nakað, ið danski forsætisráðharrin sær sum ein møguleika.

– Tað kann eg als ikki ímynda mær. Tá ið donsk málsøki verða yvirtikin, so er tað við tí endamáli, at tey hareftir vera verandi á føroyskum hondum. Eg vil sostatt avvísa hatta fullkomiliga, sigur Anders Fogh Rasmussen

Norðurlandaráðið:

## Føroyskur limaskapur aftur á breddan

**Forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, sigur, at Danmark fer at virka fyri, at Føroyar og Grønland fáa eina støðu í Norðurlandaráðnum, sum í praksis merkir, at londini virka sum sjálvstøðugir limir**

RÍKISFUNDUR

*Heri á Rógvi/*
*Páll Holm Johannesen*

**Leynar:** – Vit vilja arbeiða fyri, at bæði Føroyar og Grønland fáa eina støðu í Norðurlandaráðnum, sum í praksis vil merkja at londini fara at virka sum sjálvstøðugir limir. Danmark hevur í løtuni formansskapin í Norðurlandaráðnum, og vit fara at taka hetta mál upp við hini limalondini.

Undir ríkisfundinum í Leynum kom undan kavi, at Danmark hevur broytt kós í spurninginum um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum. Hóast eitt einmælt løgting hevur atkvøtt fyri, at Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum, so hava danir verið trekir til at stuðla føroyska ynskinum.

Hóast danir framvegis ikki vilja ganga føroyska ynskinum fult á møti, so eru teir kortini meira positivt sinnaðir enn nakrantíð.

– Norðurlandaráðið loyvir bert sjálvstøðugum limalondum, og tí fara vit at virka fyri, at Føroyar og Grønland gjøgnum eina protokol, sum verður løgd afturat høvuðssáttmálunum í Norðurlandaráðnum, fáa eina støðu, sum í praksins merkir sjálvstøðugan limaskap bæði í tinginum og ráðharraráðnum. Vit ætla at fáa eina skjóta avgreiðslu av málinum, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Løgmaður segði vera positivan um ætlanirnar hjá forsætisráðharranum. Hann tók kortini ta fyrilit, at hann vildi tosa nærri við restina av samgonguni, áðrenn hann endaliga tók støðu til málið.